# Óhóskandi fyr



*Tað var fjálgt í Fuglafirði týskvøldið inni í hugnaliga Ribarhúsi.*

**Speiskar, sorgblíðar, skemtiligar. Allar meiningar um list fingu pláss í Ribarhúsi í Fuglafirði týskvøldi í gamla goymslubygninginum, sum gjørdist ein listaperla, og sum í løtuni hýsir síni 50. listaframsýning**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard, anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

- Ein góður listamaður er ein deyður listamaður, sum onki seldi, meðan hann livdi. So vita tit tað, tit sum klára at fylla Listaskálan við áskoðarum ella liggja ovast á metseljaralistanum hjá bókasøluni! Speisemið feilt onki, tá Justinus Eidesgaard undirhelt eitt stúgvandi fult Ribarhús í Fuglafirði týskvøldi við sínum erligu og sera bersøgnu hugleiðingum um, hvat list er fyri nakað. Annars gjørdi hann vart við, at tey, sum væntaðu sær eitt svar uppá spurningin, fóru at fara skuffaði avstað aftur. Skuffaður var tað nú neyvan nakar, sum bleiv - kanska onkur sjálvhátíðarligur snobbur, men teimum var tað ikki rættiliga pláss fyri í gamla goymslubygninginum við síðuna av Piddasahandli hesa løtuna.

...

Hugtakandi málningarnir hjá Heðini Kambsdal, sum hanga á vegunum í Ribarhúsi beint nú, siga eina søgu. Ikki bara hana, um eitt serligt listahugflog, men eisini eina um nakrar ídnar eldsálir í Fuglafirði, sum megnaðu at umskapa ein gloymdan goymslubygning til eina listaperlu av tí ektaða slagnum. Tað, sum byrjaði sum ein roynd at lokka okkurt smæðið listafólk út úr kjallaranum við eini skitsu ella kanska báðum tveimum, er eftir bert fáum árum vorðið eitt tað mest lokkandi savningarstaðið fyri listafólk og listaáhugaði í Føroyum. At sleppa at sýna fram í Ribarhúsi er vorðið ein heiður og at trína inn er ein fragd av teimum fáu. Framsýningin hjá Heðini beint nú er tann 50. í røðini og tað høvdu tey, sum eiga lívið í Ribarhúsi, sett sær fyri at hátíðarhalda. Ella gera eitt sindur burturúr er nokk rættara orðið, tí serliga hátíðarlig vóru tey ikki, Lena og Niclas, sum ikki lótu streymslit órógva spæligleðina, Lena L. Mohr, fuglfjarðagentan, sum gjørdist havnakvinna, og hesuferð gjørdi sær sínar tankar um List og samskifti, metseljarin sjálvur, Justinus Eidesgaard, sum hevði sett sær fyri ikki at svara spurninginum "Hvat er list" og skemtarin, Heri Simonsen, sum grunaði yvir, hvør munurin er á at innrømma og innramma síni mistøk, og hví Jeepurin hjá Trónda Patursson ikki hevur flagtak ...

...

Tá tað nú ikki ber til at forklára fólki, hvat góð list er fyri nakað, hví so ikki bara taka hana við sær og vísa teimum hana? So Justinus Eidesgaard hevði fylt sær bilin bil við sínum yndismálningum og tikið teir við sær í Riberhús. Soleiðis. Gerið so væl. Upp á staffeliið kom ein ovurstórur málningur av eini naknari kvinnu, og Justinus var fyndarglaður, tí nú slapp hann endiliga at vísa málningin, hann annars má goyma í kjallaranum, tí tað ikki sømir seg at hava slíkt hangandi í stovuni. Tað er ov galið, helt Justinus, tí hvat skal listin, um hon ikki skal øsa, sjokkera, rúsa, arga. Nei, føroysk list er alt ov skikkilig, og torir ikki at vísa føroyingar, tá teir bera seg at, sum menniskju, segði Justinus, meðan hann tosaði seg enn heitari

- Eg sakni heitu lýsingarnar av bilfríggjunum, sum eru grundarlagið undir teimum flestu hjúnarbondunum. Eg sakni skríggjandi elskhugsýlini millum fjøll í myndlistini. Eg sakni listina, tá sorgin sveipar sín náðileysa koyril yvir sam-



*Lena og Niclas lótu tónleikagleðina fylla hvønn krók í gamla goymslubygninginum*



*Listamaðurin Heðin Kambsdal eigur 50. framsýningina í Ribarhúsi, sum er at sígga í løtuni*